Kommunusamskipan Føroya

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Kommunusamskipan Føroya, KSF, at byrja 1. august 2008. Talan er um farloyvisstarv.**

### STARVIÐ

Í samstarvi við aðalskrivara og umsiting fert tú at taka tær av felags áhugamálum hjá limakommununum.

Tú fert m.a. at:

- fremja vanligt skrivstovuhald, eitt nú bókhald, journal, postavgreiðslu og innkeyp
- skipa fyri og vera við í tiltøkum hjá KSF
- samskifta við landsmyndugleikar, áhugabólkar og onnur
- fyrireika fundir, skeið og annað felagsvirksemi
- fáa til vegar kunning og tilfar til limakommunurnar

### FØRLEIKAR

KSF roknar við, at tú:

- hevur skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- hevur áhuga í kommunuviðurskiftum
- hevur góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin
- tolir, at arbeiðsbyrðan stundum er stór, og at arbeiðstíðinar onkuntíð eru skiftandi

### KSF BJÓÐAR

Eitt livandi og spennandi arbeiðsumhvørvi við nógvum og fjølbroyttum uppgávum. Harumframt fært tú góðar møguleikar fyri fakligari menning, skeiðsvirksemi o.ø.

### SETANARTREYTIR

Talan er um fulltíðarstarv. Starvsstaðurin er Tórshavn. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóan Petur Hentze, aðalskrivara, á tel 302 482 ella 282 480.

**Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera KSF í hendi í seinasta lagi 10. juni 2008.**

**Send umsóknina við vanligum brævi til:**

**Kommunusamskipan Føroya, KSF**
**R.C. Effersøes gøta 30**
**100 Tórshavn**

**ella við teldubrævi til jph@ksf.fo.**

Kommunusamskipan Føroya er tvørkommunalur felagsskapur, ið virkar fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði. Aðalhugsjónin er, at kommunurnar skulu umsita øll mál, ið eru beinleiðis viðkomandi fyri borgaran.

KSF arbeiðir fyri greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og at kommunali myndugleikin verður styrktur. KSF veitir m.a. løgfrøðiliga ráðgeving, skipar fyri skeiðum, gerð av felags mannagongdum og kunning til limakommunurnar og almenningin.

Limakommunurnar í KSF eru Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna, Runavíkar kommuna, Tvøroyrar kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Vágs kommuna og Sands kommuna. KSF umboðar 69 % av íbúgvunum í Føroyum.

www.ksf.fo



## *Opel Vectra 2.2 GTS*

*Sera vælútgjørdur Opel Vectra 2.2 GTS frá 2003 til sølu. Hevur m.a. 18" alu-felgur. Koyrt 81.000 km. Prísur: 150.000 kr.*

*Tlf. tel. +45 30 58 80 32 ella +45 26 70 80 32*

## Bilur til sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.



**Ring 284444**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!